## DAGSINS MEINING

# Suðuroyggin og framtíðin

Løgmaður, varaløgmaður og landsstýrismaðurin í oljumálum fara at vitja í Suðuroy í næstum. Hetta hendir eftir at umboð fyri Suðuroyar Oljuvinnuráð mikudagin høvdu fund við landsstýrið. Suðuroyingar eru ónøgdir við avgerðina at vraka Suðuroynna, tá tað snýr seg um útgerðarvirksemi. Landsstýrið ella partar av tí hava sagt seg vilja lurta eftir suðuroyingum. "Allar síður eru ikki syftar enn, og spurningurin er ikki endaliga avgreiddur" skrivar samgongutingmaður í bløðunum. Og formaður Tjóðveldisfloksins hevur úttalað, at landsstýrismaðurin skal halda seg til samtykt løgtingsins.

Spurningurin er, hvat nú fer at henda. Sum skilst á landsstýrismanninum í oljumálum, gongur málið nú sína gongd. Fyrsta dagin verður avgjørt, um útgerðarhavnin verður í Havn ella í Runavík. Í lógini um fyrsta útbjóðingarumfar stendur m.a. :"Tá landsstýrismaðurin veitir loyvi, skal hann leggja dent á, at leitingar- og framleiðsluvirksemi úr Føroyum eisini fer fram í útjaðaranum". Nú Suðuroyggin ikki slapp uppí part hevur landsstýrismaðurin gjørt greitt, at oljuverja ol útgerð skal vera í Suðuroynni. Men hetta eru suðuroyingar ikki nøgdir við. Teir vilja hava veruligt virksemi. Spurningurin er, hvat trýst hinir flokkarnir í Tinganesi ætla at leggja á oljumálaráðharran og hvat hann fer at góðtaka av slíkum. Hvussu víkir og vendir so verður talan um at tulka umrøddu lógargrein. Og tulkar oljumálaráðharrin hana sum at tað er nokk at leggja oljuverju í Suðuroynni í fyrstu syftu, tá er spurningurin, hvat restin av landsstýrinum fær gjørt.

Tað er annars uppá tíðina, at landsins hægstu menn og kvinnur leggja leiðina suðureftir at síggja og hoyra, hvussu støðan er í oynni. Fáur man ivast í, at samfelagið Føroyar hevur eisini eina ábyrgd av at vera við til at menna teir partar av landinum, sum eru afturútsigldir.

Nógv útgerðarvirksemi verður neyvan fyrr enn olja er funnin og framleiðsla byrjar og hevur oljumálaráðharrin sagt, at tá eigur Suðuroyggin at koma uppí part. Sama segði útlendskur útgerðarmaður við Sosialin herfyri.Vildi tað tí verið eitt hugskot fyri at geva suðuroyingum trúgv uppá framtíðina, at tingið t.d. samtykti, at partur av virkseminum skal oyramerkjast til Suðuroynna, um framleiðsla verður.

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI

### Jógvan við Keldu 57



Týsdagin vóru 57 ár ligin síðan, helst tann mest landskendi klakvíkingurin, Jógvan við Keldu, varð borin í heim. Og Jógvan er kendur fyri at vera ein tann mest lokali politikkari vit nakrantíð hava átt. Hann er klaksvíkingur um ein háls og hann dylir ikki fyri, at tað er lokalpolitikkurin, sum hevur hansara stóra áhuga, hóast hann hevur sitið á tingi í fleiri ár.

Jógvan umboðar tey uttan fyri høvuðsstaðin. Tú hoyrir hann ofta nýta málburðin: "Tey ella teir suðuri í Havn." Bygdafólk kunnu kenna seg trygg við Jógvan og serliga tey har norðuri frá, fyri at nýta hansara egna málburð, har hann er ættaður, býr og starvast.

Jógvan er lokalpolitikkari og hann hevu sitið við róðrið Klaksvík í mong ár. Hann hevur stýrt millum høgu fjøllini og tað hevur ikki altíð verið lætt. Fyrst í nítiárunum herjaði kreppan og Klakksvíkin lá lamin eins og til eina jarðarferð. Har vantaði bert fløggini í hálvari stong. Men Klaksvíkin hevur reist seg aftur og Jógvar er ein av teimum, sum hevur skapt karmarnar, soleiðis at vinnan nú hevur møguleikar at blóma.

Hóast sigurharri við kommunuvalið, so eydnaðist tað ikki honum at setast aftur í formannssessin, men hann hevur ongar ætlanir um at fara at reka ein óvirknan andstøðupolitikk í býráðnum, nú hann ikki longur hevur avgerandi orðið at siga. Í oyrum Jógvans finnst ikki orðið andstøða. Hann heldur ikki, at hetta orði eigur pláss hjá ábyrgdarkendum fólkavaldum politikkarum. Honum dámar nógv betri orðið "minniluti" og hann ætlar sær at føra ein positivan og avrikssøkjandi politikk í minniluta.

Umframt politikk, so hevur Jógvan eisini onnur áhugamál. Hann er virkin í Brøðrasamkomuni, ein av teim dyggu stuðlunum í Betesda og hann hevur lívgað kórsanginum í Klaksvík nógv. Í stovuni stendur ein flygel við snútanum beint úr móti Klakki, næstan sum ein flótti í eini bygd, har fiskur er í hvussu er annað orðið, verður muðurin latin upp. Men Jógvan er musikalskur og er góðalag í vertsskapi, so er hann heldur ikki bangin fyri at taka fiólina fram og spæla lættari tónleik. Jógvan er fjølbroyttur, og tónleikarliga, so er tað ikki bara mangan tungi skaldskapur Victors, har hann flytir seg fram "á hesi troyttandi ferð..." móti endanum og glæsiliga ævinleikanum, ið hugtekur Jógvan við Keldu. Annar tónleikur er eisini á skránni.



*Bergur Hanusson, djóralækni*



*Heri Joensen, prestur*



*Heri Kragesteen, sálarfrøðingur*



*Ingi Højgaard, løgfrøðingur*



*Jens Andreassen, lækni*



*Jóhanna á Tjaldrafløtti, føðslu/húsarhaldsfrøðingur*



*Jón Klein Olsen, politistur*



*Jón Kragesteen. Ferðslutrygd*



*Julianna Næs, pedagogur*



*Sjúrður Johannesen, sosialráðgevi*



*Turid Thomsen, lestrarvegleiðari*



*Marius Staksberg, málfrøðingur*

**Svarini verða prentað í blaðnum mikudag**

# Spyrjið serfrøðingarnar

Adressan: Sosialurin, box 76, 110 Tórshavn, Fax 314720 ella teldupost: spyr@sosialurin.fo – og merkið, hvørjum tit seta spurningum.


# Tøkk

Øllum tykkum, sum sýndu samkenslu, tá kæri pápi, verpápi og abbi okkara

**Peder Haugaard Andersen**

doyði og varð jarðaður, takka vit hjartaliga.

**Martha, Inge, Birthe og Rose**



**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.